# Kawasaki VN 2000





**Kawasaki VN 2000 er ein tekniskt framkomin súkkla, sum í nýggjastu 2008 útgávuni er dagførd við ymiskum broytingum, bæði hvat designi og teknologi viðvíkur**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Kawasaki VN 2000 er ein tann størsta motorsúkklan av sínum slagi við V2 motori á marknaðinum. Motorurin við 2.053 cc og 103 hk hevur eitt botntrekk upp á 177 Nm við 3200 snún/min og koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,1 sekund og toppferðin er 210 km/t.

Kawasaki VN 2000 er ein sonevnd Cruisersúkkla. Málsetningurin hjá Kawasaki í Japan er at gera VN 2000 eina tekniskt framkomna, væl virkandi og trygga súkklu. Hon er útgjørd við allari tekniskari útgerð, sum hoyrir til eina slíka súkklu.

Í 2008 útgávuni er Kawasaki VN 2000 dagførd við ymiskum tekniskum broytingum. At síggja til er størsta broyingin forlyktin, sum nú situr sjálvstøðug millum forgaflarnar í mun til forgangarin, sum hevði innbygda forlykt.

Nýggja VN 2000 tekur seg væl út og er góð at sita á og at koyra. Hon er sera kvik, og koyriegineikarnir eru heilt í topp og instrumentini eru løtt at avlesa undir koyring.

Tað er MC-Sølan á Norðasta Horni í Havn sum umboðar Kawasaki motorsúkklurnar.

Fyritøkan umboðar motorsúkklumerkini Suzuki, Kawasaki og Ducati.

Á heimasíðuni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leinkjum til aðrar MC-síður.

### Kawasaki VN 2000

| | |
|---|---|
| **Motorur** | 2.053 cc 2 syl. 4-takt vatnkøldur við 103 hk |
| **0-100 km/t** | 4,1 sek (5-gir) |
| **Toppferð** | 210 km/t |
| **Dekkstødd** | 150/80 R 16 (framman)<br>200/60 R 16 (aftan) |
| **Stødd og vekt:** | |
| **Longd** | 253,5 cm |
| **Seturhædd** | 68,0 cm |
| **Fríhædd** | 13,5 cm |
| **Vekt** | 340 kg |
| **Prísur** | kr. 176.900 |
| **Søluumboð:** | Sp/f MC-Sølan<br>Skemmingsgøta 23<br>Tel. 311101 / fax. 313763<br>www.mc-solan.fo |

# Koenigsegg yvirhála Bugatti

Á svensku sportsvognsverksmiðjuni Koenigsegg er tey í ferð við at leggja seinastu hond á teirra nýggja sportsvogn, Koenigsegg CCX R, sum við eini toppferð upp á yvir 400 km/t verður skjótari enn Bugatti Veyron, sum í dag er heimsins skjótasti, dýrasti og kvikasti bilur.

Eftir hvat skilst verður Koenigsegg CCX R ein bilur við 4,7 litra motori við 1018 hk og kemur at kosta umleið 17 milliónir krónur. Bugatti Veyron hevur 1001 hk.

mg




*Koenigsegg CCX R ein bilur við 4,7 litra motori við 1018 hk*



*Bugatti Veyron er í dag heimsins skjótasti, dýrasti og kvikasti bilur*